# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*-Vit iðra okkum ikki um tað, sum vit gjørdu hendan dagin, tí tað ráddi um at fáa enda á krígnum*

*(Manningin á „Enola Gay“)*

## Børnini eru ikki foreldraleys

**Kanningar hjá Reyða Krossi vísa, at tey flestu børnini, sum skuldu flytast úr Tjad til Evropa, hava minst annað av foreldrunum á lívi**

Myndugleikarnir í Tjad hava skuldsett seks franskar og sjey spanskar ríkisborgarar fyri at hava havt ætlanir um at burturflyta 106 børn til Evropa. Børnini skuldu við einum sponskum flogfari til Fraklands, men myndugleikarnir fingu snevilin av ætlanini og steðgaðu flogfarinum í síðstu løtu.

Seks av teimum skuldsettu arbeiða hjá franska hjálparfelagsskapinum Zoes Ark, og tey hava greitt tjadsku myndugleikunum frá, at børnini eru foreldraleys og úr ófriðarliga sudanska landspartinum Darfur. Men kanningar hjá Reyða Krossi hava avdúkað, at 91 av børnunum hava minst annað av foreldrunum á lívi, og at tey flestu børnini eru úr Tjad og ikki úr Sudan. Ein trupulleiki er, at nógv av børnunum eru so smá, at tey duga ikki at siga, hvar tey búgva.

Forsetin í Tjad, Idriss Deby, hevur sagt, at tey, sum ætlaðu at flyta børnini av landinum, verða revsað. Hann hevur tó bent á, at tríggir franskir blaðmenn, sum vórðu tiknir saman við hinum, kunnu sleppa til Fraklands, og at flogternurnar á spanska flogfarinum eisini kunnu sleppa til hús.



*Fleiri hundrað fólk í Tjad mótmæltu í gjár ætlanini at flyta børn til Evropa*

## Hiroshima-flogskiparin deyður

**Paul Warfield Tibbets Jr., sum var flogskipari á flogfarinum, sum slepti kjarnorkubumbuni niður yvir Hiroshima, er deyður**

Eftir egnum ynski fær tann 92 ára gamli fyrrverandi flogskiparin hvørki grøv ella gravstein, tí hann bar ótta fyri, at fólk, sum eru ímóti kjarnorkuvápnum, skuldu gera seg inn á grøv hansara.

Paul Warfield Tibbets Jr. skrivaði navn sítt í heimssøguna tann 6. august í 1945, tí hann var flogskipari á amerikanska flogfarinum „Enola Gay“, sum hendan dagin slepti einari kjarnorkubumbu niður yvir japanska býin Hiroshima.

- Tá eg fekk uppgávuna, visti eg, at hetta fór at verða ein kensluborin dagur, men vit noyddust at leggja kenslurnar til viks. Eg eri ikki stoltur av at hava verið 80.000 fólkum at bana, men eg eri stoltur av, at alt gekk, sum tað skuldi, segði Tibbets í einari blaðsamrøðu í 1975.

Hiroshima-bumban drap 80.000 fólk, men umleið 60.000 onnur doyðu seinni av bumbuni, sigur BBC.



*Paul Warfield Tibbets Jr. nevndi flogfar sítt „Enola Gay“ eftir mammuni, sum fekk hann at læra til flogskipara*



## Fylti 100 og setti heimsmet

Í Bretlandi eins og á okkara leiðum er tað siður, at fólk, sum fylla 100, fáa eina heilsan frá landsins ovasta myndugleika, og Peggy McAlpine fekk eisini eina heilsan frá Elisabeth drotning á 100 ára degnum. Men Peggy vildi hava meiri burtur úr degnum, so hon gjørdi av at leypa út av einum 762 metrar høgum fjalli á Kýpros saman við einum hjálparmanni undir einum sonevndum paragliderskíggja. Nú kemur hon í metbókina hjá Guiness, tí hon er heimsins elsta kvinna, sum hevur roynt slíkt. Peggy hevur longu sagt, at hon er til reiðar at leypa eina ferð afturat.

## STUTT SAGT

### Táragass eftir studentum

Løgreglan í Venesuela brúkti táragass og vatnkanónir, tá fleiri fleiri túsund studentar gingu mótmælisgongu ímóti politikkinum hjá Hugo Chavez, forseta. Løgreglumenninir skutu eisini við gummikúlum. Studentarnir eru serliga misnøgdir við eitt uppskot hjá forsetanum at broyta venesuelsku grundlógina. Eftir uppskotinum verður einki mark fyri, hvussu ofta ein forseti kann veljast aftur. Chavez sigur, at fólkaatkvøða verður um broytingina í næsta mánað, men studentarnir vilja hava betri stundir til at viðgera uppskotið.

### Ávarar Evropa

Forsetin í Iran, Mahmoud Ahmadinejad, ávarar nú tey stóru londini í Evropa ímóti at taka undir við amerikonsku stjórnini og hennara fíggindaliga ágangi ímóti Iran, sum tikið verður til. Ahmadinejad sigur, at Iran heldur eyga við, hvat Evropa ger, og at hann ávarar tey evropeisku londini ímóti at fremja nøkur tiltøk ímóti landinum. Forsetin sigur, at koma nøkur ágangandi tiltøk úr Evropa, fara iranar at hava tað í huga tann dagin, teir fara at svara aftur.

### Chrysler sendir 10.000 til hús

Amerikanska bilverksmiðjan Chrysler kunngjørdi í gjár, at hon ætlar at siga 10.000 fólkum úr starvi næsta ár afturat teimum 13.000, sum fyrr hava fingið fráboðan um uppsøgn. Fyritøkan sigur, at sølan í ár er á einari leið, men at roknað verður við minni sølu næsta ár. Fyri einum ári síðani keypti amerikanska íløgufyritøkan Ceberus 80 prosent av partabrøvunum í Chrysler, og fyritøkan ásannar, at útlitini eru versnað nógv hetta árið.